*Framhald av síðu 9*

*upp, tess kropsligu dimensjónir runnu saman við tí ómetaliga samfelda streyminum, sum rak hann út í miðjuna á tí velduga flógvanum ... oman eftir ævinleikaáar breiðkandi víddum.*

Í fyrsta parti av hesi ritroynd varð nevnt, at J.G. Ballard er ávirkaður av surrealistiskari myndlist. Hetta sæst m.a. týðiliga, um ein hyggur at, hvussu hann í summum av sínum søgum roynir at relativisera sjálvt tíðarhugtakið. Nakrir av surrealistunum, eitt nú bæði de Chirico og Salvador Dali, taka tíðina til viðgerðar í sínum verkum, sum sæst av eitt nú teirra "tíðleysu" landsløgum og teirra áhuga fyri urum og klokkum. Dali las ein hóp um bæði støddfrøði og alisfrøði, og hann roknaði Einstein sum eina av sínum mætastu fyrimyndum. Ein eigur at gera sær greitt, at listafólk sjáldan hava veruligt vísindaligt innlit, men at summi teirra eftir førimuni, og á sín hátt, royna at viðgera t.d. alisfrøðilig framstig. Tey bleytu urini hjá Dali eru hansara máti at geva relativitetsástøðinum hjá Einstein myndlistarligt útlát. Í stuttsøguni "The Terminal Beach", sum helst er eitt av Ballards høvuðsverkum, finna vit vendingina "kvantisk tíð" (quantal time). Traven, høvuðspersónurin í søguni, roynir at sættast við – og fáa sálarbót fyri – eitt kjarnorkukríggj, eitt alheimligt armageddon, sum eftir vanligari tíðarrokning ikki er komið. Við "kvantiskari tíð" tykist Ballard, sum eisini í "The Voices of Time", at sipa til eitt hugtak, har tíðin ikki longur er ein teinur, myndliga lýst við tíðarpílinum, men har fortíð og framtíð flatna og onkursvegna renna saman.

Um vit nú taka tráðin uppaftur – um gávuna hjá Cro-Magnon-menniskjanum at skapa symbol – so er J.G. Ballard ein rithøvundur, sum við óvanligum medviti og konsekvensi arbeiðir við ímyndum. Hansara ímyndaheimur er óvanliga rúmur og fevnir lutvís um algongd symbol, men úrvalið, endurtøkurnar, samansetingin og mátin hann brúkar ímyndirnar uppá geva symbolistinum og imagistinum J.G. Ballard sítt heilt serliga merki. Rósa og lilja, ravnur og dúgva, hesar og aðrar ímyndir eru kendar úr klassiskum bókmentum og ganga aftur hjá nútíðar rithøvundum. Eyðkent fyri Ballard er, at hann, umframt at geva lutum og kyktum úr tí gamla heiminum sess í síni illumineraðu bókmentaligu kirkju, tykist at hava trároynt 20. aldar funktionalistiska og surrealistiska gerandisdag, okkara byggilist, ferðslutól, vápn, hentleikar, allar okkara tøkniligu formar. Tann niðurlagdi svimjihylurin í "The Voices of Time", bumbuskýlini í "The Terminal Beach", marghæddaðar bilparkir, yvirvaksnar futuristiskar vegasamankomingar og rundkoyringar – nútíðarmyndir sum hesar verða í ritverki Ballards til emblem. Tað er nakað merkiligt og grípandi við hesum sofistikeraða rithøvundinum, sum hevur búð meginpartin av sínum lívi í Shepperton uttan fyri London, og sum framvegis megnar at hyggja at teimum tornum og rimaverkum úr stáli og betongi, sum eru okkara gerandisdagur, við barnsins undrandi eygum.

Hvat merkja hesar ímyndir? Í fyrsta lagi vita vit frá høvundinum sjálvum, at hann fatar okkara modernaðu futuristisku formar sum frávarp runnin úr menniskjans sál, sum mental landsløg. Haraftrat kann ein og hvør, sum bara brúkar gonguvit, skjótt koma eftir, at ein ávís angist er knýtt at okkara modernaðu stremban, vit byggja okkara risaskip og okkara veldugu snarflogfør – bæði *Titanic* og tann supersoniska flúgvaran – við einum frískligum sjálvsáliti, men samstundis anir í okkara sál ein platonskur nemesisótti, minnið um tað hástóra Atlantis, sum gudarnir lótu søkka í eini veldugari vatnflóð. Ein farri av hesi angist streymar gjøgnum ritverkið hjá Ballard, og sum lýsari av tí modernaða vanlukkuóttanum – sum vit í dag síggja lýstan, á løriftinum, av hundraðtals vatndeyvum og dygdarsørum sápuoperum - er hann helst eitt fitt petti undan síni tíð.

Umframt tær ímyndir sum longu eru nevndar, finna vit í skaldsøgunum og stuttsøgunum hjá Ballard eitt nú: avlagdar flogvøllir, útvarpsteleskop, sandheyggjar, deyðar fiskar, gággur, skriðdjór, sorlað rúmdarskip, tómar býir, bygningar undir í vatni ella sandi, tyrlur, krokodillur, uttandura biografar, tóm, hvít hotell, koralloyggjar osfr.

Ballard-serfrøðingurin David Pringle hevur í einum gitnum essay viðgjørt hetta ímyndaliga universið. Hann leggur í síni grein dent á, at Ballard er ikki ein stívrendur, didaktiskur høvundur, sum við fremstafingri á lofti vil fortelja sínum lesarum sannleikan um lív og deyða, men at hann nettup er skald, og at hansara ímyndaheimur av tí sama er margtýddur og gátuførur. Hansara niðurstøða er kortini, at talan er um eina stigskipan (eitt hierarki) av ímyndum, sum allar leysliga kunnu savnast undir fýra meginsymbolum, sum eru: hav, sandur, betong og krystall. Hesar høvuðsímyndir tykjast aftur at vísa til fýra univers: fortíð, nútíð, framtíð og ævinleikan.

Til seinast í hesum parti fari eg stutt at nema við tað fyrsta av hesum universum. Ímyndirnar í skaldsøguni *The Drowned World* siga frá einum drátti aftureftir móti tí havi, haðani alt lív upprunaliga er sprottið, og tí vatni, sum er grundin undan menniskjans fyrstu mentanum, eitt nú teirri egyptisku og ríkinum rundan um Eufrat og Tigris. Talan tykist at vera um ein vatnlongsul, sum lutvís verður lýstur sum eitt slag av lívfrøðiligum bakráki, ein afturvendan til eitt farið søguligt stig, og lutvís sum ein sálarligur rangdráttur, eitt slag av menningarligari regressión. Hetta seinasta fyribrigdið verður, meistarliga og samstundis sera óhugnaliga, lýst í stuttsøgum sum "Mr F. Is Mr F.", "Now Wakes the Sea" og "The Gioconda of the Twilight Noon".

whazzzup!!!

Forrige · Næste · Svar · Svar alle · Videresend · Flag · Udskriv · Rediger · Slet · Ombryd igen · Udkast

**TELDUBRÆVIÐ**

Frá: Høgni í Jákupsstovu, San Francisco, hojak@hotmail.com
Til: turid@sosialurin.fo
Evni: Vikuskifti

# Fjarari, men ikki gloymt

CNN, BBC, DR, TV2, ÚF, SVF og allar aðrar tíðindastøðir í heiminum vísa tær somu myndirnar, og tosa um ta somu hendingina. Myndirnar frá teimum deyðadømdu tvíburðatornunum í New York ganga heimin runt og allur heimurin heldur andanum, tá ið tað óhugsandi hendur. Tornini rapa og Amerika er farið í hernað. Í hernað ímóti yvirgangi. Nostradamus verður dustaður av og nærlisin enn einaferð. Og sjálvandi hevur hann spátt, at World Trade Center fór at falla. Undirgangur heimsins er nær. Ein lítil detalja, um at gamli Nostradamus ikki hevur skrivað nakað um tornini, gleppur ímillum. Men skaðin er hendur og heimurin er ótryggur.

Fáar mánaðar seinni skal eg til San Francisco at lesa. Tað hendi meira enn einaferð, at onkur hugdi eitt sindur skeivt, tá eg segði, at eg skuldi til USA. Eitt eygnakast, sum segði, at eg kundi ikki vera rættsiktaður at fara til Amerika, har er jú kríggj!

Síðani er Taleban-stýrið fallið, Osama Bin Laden er sum sokkin í jørðina, meðan hermenn hansara berjast til seinasta mann í Afghansku fjøllunum. George W. Bush og Colin Powell royna at sløkkja bálið í Miðeystri.

Eg var eitt sindur spentur at vita, hvussu skilið fór at vera, tá eg kom til USA. Trygdartiltøkini vóru jú herd munandi um allan heimin, nú skuldi tú checka inn 2 tímar áðrenn fráferð og ferðafólk skuldu fyrireika seg til at vera kannað í høvur og enda.

Aftaná eina langa flogferð kom eg so endiliga til San Francisco International Airport og skuldi framvið einum grummum manni inni í einum lítlum glasbúri. Men hvussu var og ikki, aftaná at eg hevði skrivað tað, sum eg skuldi, var eg latin inn í landið. Uttan at fara úr klæðunum, uttan, at kuffertini vóru kannað og uttan at onkur maður kom undan einum glasveggi og bað um at tosa við meg undir fýra eygum.

Tað er eingin ivi um, at yvirgangsálopið hevur sett síni djúpu spor í amerikanska fólkið. Tað hevur nærum ikki verið dagur har 9/11, sum amerikumenn rópa dagin, varð nevndur. David Letterman, Jay Leno og hinir sjónvarpsvertirnir hava framvegis onkrar skemtisøgur um Osama Bin Laden, og fólk kunnu ikki semjast, hvat skal gerast við Ground Zero. Skulu tornini endurreisast, skal økið verða ein minnisvarði ella hvat? America open for business skelti eru í hvørjum handilsrúti og flest allir amerikumenn vita nú, hvar Afghanistan er.

Men líka síðani, at George W. Bush endaliga kundi siga, at tað var Osama Bin Laden, sum hevði ábyrgdina, hevur kríggið ímóti yvirgangi verið eitt rímiliga dult kríggj. Tíðindamenn hava sera torført við at sleppa framat hermótinum og í USA er dagligdagurin komin aftur.

Einans eitt hálvt ár aftaná ,at David Letterman varð heiðraður fyri at halda fram við skemtisendingini hjá sær dagin aftaná herviliga álopið, er størsta søgan í USA, at hann møguliga flytir frá CBS sjónvarpsstøðini til kappingarneytan ABC. Bløðini eru farin at tosa um sjónvarpið aftur. Hvør vinnur Survivor - tað er amerikanska útgávan av Robinson - ella hvørja av teimum 25 giftingarhugaðu kvinnunum fer einsamalli hanin í The Bachelor at velja. Enron gølan og sváru trupulleikarnir við kynsligum yvirgangi í katólsku kirkjuni fáa ta rúmd í fjølmiðlunum, sum slíkar søgur eiga. Sterku kenslurnar, sum brendu í amerikanska almenninginum í vikunum og mánaðunum aftaná 11. september, eru ikki so eyðsýndar longur. Tá ið Oscar standmyndirnar vóru latnar herfyri, varð nógv tosað um, hvussu verturin Whoopi Goldberg fór at megna at lata vera við at tosa um svarta týsdagin.

Opna sárið í amerikanska fólkinum er um at lekjast, men minnið verður ikki gloymt. Á sama hátt sum the Day of Infamy, álopið á Pearl Harbor, framvegis livir í amerikanska minninum, fer minnið um 11. september 2001 at liva.

Men um støðan er so ring nú - meira enn eitt hálvt ár aftaná - sum New York Times og nógvir aðrir við teimum skrivaði 13. september, so er tað torført at merkja her í America. Er talan veruliga um triðja heimsbardaga, so er hesin heimsbardagin annarleiðis enn hinir, sum undan fóru.

Eitt stríð, sum fáir servandir amerikanskir hermenn skulu taka sær av langt heimanifrá.




## Sethús og jørð í Trongisvági til sølu

Um hóskandi boð fæst, verður við hesum lýst til sølu:

**Matr.nr. 129**
- Uttangarðs 4 gl. í Ranghaga, umframt 13.738 $m^2$ innangarðs í 3 lutum, harav tann eini luturin er uml. 9.000 $m^2$ við ástandandi sethúsum frá miðskeiðis í 1990unum. Sethúsini eru í einari hædd á 120 $m^2$, umframt kjallari á uml. 35 $m^2$, »krúpikjallari« á uml. 40 $m^2$ og uppíbygt seyðahús á uml. 66 $m^2$ íroknað 2 súrhoyggjbrunnar. Við sethúsini er eisini inngyrdur havi og hjallur/høsnarhús á uml. 18 $m^2$.

**Matr.nr. 128a**
- Traðarstykki á 2.858 $m^2$.

**Matr.nr. 16a**
- Innangarðs tilsamans 8.582 $m^2$ í 2 lutum, umframt 1 gl. í Ranghaga.

**Matr.nr. 17a**
- Innangarðs 1 lutur á 6.189 $m^2$, umframt 1 gl. í Ranghaga.

**Matr.nr. 95d**
- Traðarstykki á 3.665 $m^2$.

Ognirnar verða seldar undir einum ella hvør sær.

Áhugaði verða biðin um at venda sær til:

**Advokatfirma Annfinn V. Hansen**

**Annfinn V. Hansen**
Advokatfirma

Bryggjubakki 22 • postrúm 106 • FO-110 Tórshavn
Tel.: 359595 • Fax: 359596 • e-mail: lawyers@post.olivant.fo



## Pedagogar til Dagstovnin á Argjum

Søkt verður eftir 1 pedagogi til stovu við 12 børnum í forskúlaaldri 6-7 ára gomul, at byrja 1. juni 2002 ella eftir nærri avtalu.

Eisini verður søkt eftir 1 pedagogi til vøggustovuna, at byrja 1. august 2002.

Dagstovnurin á Argjum er ein sjálvsognarstovnur. Á stovninum ganga 72 børn og samanlagt eru vit 18 starvsfólk.

Á stovninum eru fýra barnagarðstovur og tvær vøggustovur, har tann eina barnagarðsstovan er ein serstova har vit samskipa deyv og tunghoyrd og hoyrandi børn.

Á hvørjari stovu ganga 12 børn.

Vøggustovan hevur tætt samstarv við serstovuna, og má viðkomandi hava áhuga í hesum serøki.

Vit ynskja, at tú saman við okkum skapar eitt umhvørvi fyri børnunum og foreldrunum, har tey kunnu trívast og mennast.

Somuleiðis, at tú ert nýhugsandi og hevur ábyrgdarkenslu. Harumframt ynskja vit, at tú ert virkin á stovninum við atliti at víðariútvikling av hesum.

Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmálanum millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Landsstýri.

Ynskir tú at vita meira um starvið, kann tú seta teg í samband við Gudrun W. Rasmussen, leiðara á tlf. 319019 ella 219019.

Umsóknin skal sendast til Dagstovnin á Argjum í seinasta lagi 11. mai 2002.



**Maskinmeistaraskúlin**
**Undir Krákugjógv 5**
**FO-100 Tórshavn**
**Føroyar**
**Tlf. +298 312661 Fax. +298 318545**

## Skeið til Kølimontør (trin 1)

**Innihald: Høvuðseindir í køliútbúnaði.**
Fordamparar, kompressarar og kondensatorar: Slag, uppbygging og virkisháttur.
**Regulering og stýring av køliútbúnaði.**
Mek. og elektroniskar reguleringseindir.
**Umhvørvið.** Árin av kølievnum.
**Lóggeving innan køliútbúnað:**
Kølebekendtgørelsen og aðrar kunngerðir.

**Fortreytir:** Skeiðluttakarin skal í minst 2 ár hava starvast í góðkendum kølivirki við uppsetan, umvæling og royndarkoyring av køliskipanum.

**Dagar:** Skeiðið byrjar hósdagin 18. apríl 2002 og verður hvønn hósdag fram til 6. juni, tá roynd verður.

**Kostnaður:** kr. 9.500,- incl. roynd

**Skeiðstað:** Maskinmeistaraskúlin, Undir Krákugjógv 5.

**Luttakaratal:** Í mesta lagi 8.

**Tilmelding:** í seinasta lagi mikudagin 17. apríl 2002 á tlf. 312661 ella fax 318545.



**Klaksvíkar Sjúkrahús**
700 Klaksvík

## Køksassistentur

Søkt verður eftir avloysara fyri køksassistent í barnsburðarfarloyvi frá 01.06.2002 til 03.08.2002 1,0000 tí og frá 01.09.2002 til 31.03.2003 0,7000 tíð.

Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Økonomafelag Føroya.

Nærri fæst at vita um starvið, við at venda sær til økonomuna tlf. 455463 lokal 202.

Umsókn við avriti av prógvi verður at senda til

**Umsjónarmannin**
Klaksvíkar Sjúkrahús
FO-700 Klaksvík

Umsóknarfreist 10.05.2002.



## Íslendskur lestrarstuðul

Íslendska Mentamálaráðuneytið bjóðar einum føroyingi stuðul (62.400 ísl. kr. um mánaðin í 8 mánaðir) til lestur í íslendskum máli og bókmentum á heimspekideild Háskóla Íslands lestrarárið 2002/03. Upphæddin røkkur til vistarhald. Studentinum verður útvegað innivist á studentagarði, og húsaleigan verður goldin av studninginum.

Námið byrjar 1. september og endar 1. mai.

Umsóknir skulu vera Setursskrivstovuni í hendi í seinasta lagi mikudagin 17. apríl 2002. Umsóknarblaðið fæst á Setursskrivstovuni.

**Fróðskaparsetur Føroya**
Setursskrivstovan
J. C. Svabos gøtu 14
Postboks 272
FO-110 Tórshavn.
Tlf. 315302
Fax. 318929.



## Starvslýsing

Í samband við, at Fuglafjarðar Mentanarhús alment verður tikið í nýtslu 8. juni, verður hervið lýst eftir dagligum leiðara til húsið og kokki at reka matstovuna sjálvstøðugt.

Meira fæst at vita við at venda sær til Sjónleikarafelagið.

Umsóknir skulu vera felagnum í hendi innan 1. mai 2002.

Við mentanarkvøðu

**Fuglafjarðar Sjónleikarafelag**
Postsmoga 14
530 Fuglafjørður
tlf. 214951 ella 211180



## Framsýning

Málninga- og handarbeiðsframsýning verður í Ribarhús í Fuglafirði fríggjadagin-sunnudagin 12.-14. apríl kl. 15.00-19.00.

Sunnudagin kl. 16.00 verður tónleikur við Fuglafjarðar Musikkskúla.

**Fuglafjarðar Kvøldskúli**


Visti tú ikki tað? Sosialurin